## Møguligur Víkingur úr Ungarn

Víkingur, sum er navnið á samanlagda GÍ/LÍF, hevur fingið ein ungverskan áleypara á vitjan. Talan er um 32 ára gamla Zoltan Bükszegi, ið millum annað hevur spælt í bestu deildini á Kypros. Hesa komandi vikuna skal Zoltan royndarvenja við felagnum, og eftir hetta verður støða tikin til, um sáttmáli verður gjørdur við spælaran, ella um hann verður sendur heim aftur.



## Góð byrjan hjá Capello

61-ára gamli Fabio Capello er ein av heimsins avgjørt bestu venjarum, og hann er nú komin í gongd sum enskur landsliðsvenjari. Spurningurin er, um hann megnar at geva fótbóltssvaka Onglandi nakað at hátíðarhalda. Áðrenn dystin, hevði italski Fabio Capello roynt at tosa minst møguligt um dystin, og at skrúða eitt sindur niður fyri forvæntningunum til hansara enska landslið. Men uttan iva man tann 61-ára gamli italiumaðurin vera fegin um at manning hansara vann 2-1. Málini hjá Onglandi skoraði Jermaine Jenas úr Tottenham og Shaun Wright Phillips úr Chelsea. Málið hjá Schweiz skoraði Eren Derdiyoh.

# Vit fara eftir steypinum

**Stjørnan er í finaluni í kvinnuhondbólti, fyri níggjundu ferð, og seinastu fimm árini hava klaksvíkskvinnur verið fastir gestir á Hálsi í Havn, har finalurnar vanliga verða spældar**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Eins og við Randi Wardum hjá Kyndli, høvdu vit Báru Skaale Klakstein gjøgnum telefonina, har vit fregnaðust um vónirnar til finaludagin, hvussu kappingarárið hevur hilnast, umframt týdningin av at hava eitt lið í einari steypafinalu.

### Heilt serligt í finaluni

- Ein finala er nakað heilt serligt, og eg vil ikki siga, at vit eru so stórir favorittar, sum fjølmiðlarnar vilja hava okkum at vera. Tað er heilt ørðvísi í einari steypafinalu, enn í Sunset kappingini. Tað er bert ein dystur, og rakar man ikki dagin, verður man straffaður alt fyri eitt, sigur Bára Skaale Klakstein, ið var til arbeiðis, tá vit fingu orðið á hana.

### Styrkt Stjørnulið

Seinastu dystirnar hevur Stjørnan havt gleði av at Durita Ljósstein er komin aftur úr Danmark, og Bára metir hana, hóast hennara unga aldur, duga ómetaliga væl at lesa spælið. Og umfram Duritu, hevur Stjørnan fingið Joan Midjord Djordjevic aftur á liðið. Joan hevur ikki fingið spælt vegna trupuleikar við eina fingrinum, men hevur tó vant saman við liðnum… Nú kann hon so nýta hondina aftur, og hon verður eisini við í hópinum, ið fer til Havnar leygardagin.

### Vænta sær ein javnan dyst

- Eg meti ikki, at tað fer at gerast ein lættur dystur hjá okkum, og eg vænti at Kyndil fer at reisa seg til umstøðurnar.

- Tað fer óivað at vera eitt heilt annað Kyndilslið, vit fara at møta leygardagin, men líkamikið hvat, so skulu vit vinna dystin, og eg eri sannførd um at raka vit dagin, so vinna vit steypið til Klaksvíkar. Vit fara í øllum førum at gera alt í okkara makt fyri at vinna dystin, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur Bára Skaale Klakstein



*Bára Skaale Klakstein sigur seg vera serliga imponeraða av ungu kreftunum á liðnum. Og hon metir, at um Stjørnan rakar dagin, kann ongin steðga teimum. Hon vil tó ikki tosa ov nógv um, at Stjørnan er so stórur favorittur*

### Góður stuðul

Vit hava altíð havt góðan stuðul frá áskoðaraplássunum, og tað er ikki bara til steypafinalur. Til allar dystir hava vit fingið dyggan stuðul, og tað merkist inni á vøllinum. Tað fjálgar, sigur Bára, ið hevur verið ein av stuðulsleikarunum hjá Stjørnuni í fleiri ár. Bára metir, at tað er av alstórum týdningi, at vinna steypafinaluna, og um so er, er tað eisini uppiborið, sigur hon, tí vit hava veruliga kempað fyri hesum.

- Vit hava stríðst og strevast til harðar venjingar í langa tíð, og tí følist tað so ómetaliga deiligt, tá man móti endanum stendur við steypi og heiðursmerkjum um hálsin, sigur Bára.

### Týdningurin

Tað er av alstórum týdningi fyri eitt felag at vinna eina steypafinalu, ella eitt FM-heiti. Tað skapar ein rættuligan dynamikk, og dregur tey yngru frameftir. Tey hava nakað at gleða seg til o.s.fr. Man kann tosa um, at tað kann útloysa eina pyramidu-effekt, tí fleiri ungdómar ynskja ivaleyst at fara at spæla hondb´lt, um besta liðið vinnur okkurt, og breiddri botnurin er, hægri nær toppurin- størri gerst pyramidan, og tað man ivaleyst vera endamálið hjá einhvørjum ítróttarfelagi.

Tá alt hetta er sagt, verður ynskt báðum liðum alt tað besta, og ein góðan dyst.

## FAKTA

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1987 | Neistin I-Neistin II | 13-12 |
| 1988 | Neistin I-Neistin II | 16-13 |
| 1989 | Neistin-Søljan | 29-07 |
| 1990 | Neistin-Kyndil | 25-12 |
| 1991 | Skála-VB | 12-11 |
| 1992 | Neistin-Kyndil | 16-09 |
| 1993 | VB-Stjørnan | 21-13 |
| 1994 | Neistin-Stjørnan | 15-14 |
| 1995 | Neistin-Stjørnan | 23-14 |
| 1996 | Neistin-Kyndil | 18-10 |
| 1997 | Neistin-Kyndil | 23-18 |
| 1998 | Neistin-Kyndil | 21-18 |
| 1999 | VÍF-StÍF | 21-20 |
| 2000 | Kyndil-VB | 22-21 |
| 2001 | VÍF-VB | 31-18 |
| 2002 | VÍF-Stjørnan | 22-18 |
| 2003 | VB-VÍF | 19-18 |
| 2004 | Stjørnan-VB | 20-19 |
| 2005 | Stjørnan-Neistin | 23-18 |
| 2006 | Neistin-Stjørnan | 18-14 |
| 2007 | Stjørnan-VB | 31-28 |

**Vinnarar frá 1987-2006:**

| | |
|---|---|
| Neistin | 11 |
| VÍF | 3 |
| Stjørnan | 3 |
| VB | 2 |
| Skála | 1 |
| Kndil | 1 |